

## Semja við pilotarnar

Føroya Arbeiðsgevarafelag og Flogskiparafelag Føroya undirskrivaðu fríggjadagin 1. apríl undir semju um leingjan av verandi sáttmála.

Semjan hevur við sær ávísar tillagingar av sáttmálanum umframt eina lønarhækking á 1,25% 1. apríl í ár. Hetta er sama lønarhækking, sum hini fakfeløgini á privata arbeiðsmarknaðinum á landi hava fingið í hesi samráðingarrunduni, sum byrjaði við arbeiðarafeløgunum í mai 2010.

Sáttmálin við Flogskiparafelagið er longdur til 1. november í ár, men lønarhækkingin er tó galdandi til 1. apríl komandi ár.



## Tikin við hassji

Seinnpartin í gjár funnu tollararnir átta gramm av hassji uppi á einum manni, sum kom við flogfarinum

Maðurin var ikki føroyingur men danskur ríkisborgari. Hann kom til Føroya, tí hann skuldi við einum skipi.

Revsingin fyri at smugla átta gramm av hassji var 1000 krónur í bót.




*Í Klaksvík eru nú ov nógv barnaansingarpláss, tí eru tey noydd at niðurlaga talið*

# Ov nógv barnagarðspláss

**BARNAANSING Barnatalið í Klaksvík er minkað so nógv, at kommunan fer at niðurlaga talið av plássum**

Randi Jacobsen

Eina ferð vóru ov fá ansingarpláss í Klaksvík, og nú eru tey ov nógv.

Dagrøktin hevði 120 pláss, men tá ið nýggjur barnagarður kom við tveimum vøggustovum, varð dagrøktin skorin niður í helvt.

Nú eru eisini ov nógv barnagarðspláss. Tørvurin er seinastu árini minkaður við 10 prosentum.

Loysnin verður helst at hava færri børn á hvørjum stovni.

Orsøkin er, at árgangirnir seinastu fýra ár hava verið lækkandi, sigur Sigrún Vágstún, barnaansingarskipari.

Um hugt verður at hagtølunum, er tað eitt sindur upp og niður, hvussu nógv børn verða fødd um árið í Klaksvíkar kommunu.

Metið seinastu nógvu árini var í 2007, tá ið 74 børn vórðu fødd. Tvey tey næstu árini fór talið niður, men í fjør vórðu aftur fleiri børn sett í verðina.

Yvirskotið av ansingarplássum kann tí illa tulkast øðrvísi enn, at ungar familjur eru fluttar burtur.

## Øðrvísi skúlavika í Nólsoy

Skúlavikan nummar 13 í Nólsoy var eitt sindur øðrvísi enn vanligt.

Í farnu viku høvdu næmingarnir í Nólsoyar skúla gjørt mangt ymiskt. Seinnapartin týsdagin sungu tey í Tilhaldinum í Nólsoy og áhoyrarunum dámdu væl. Mikudagin fóru allir næmingarnir til sjónleikin "Svíkjarin" og afturat møguleikanum at síggja størru næmingarnar norðanfyri syngja, dansa og spæla, varð sjálvsagt gingið niðan í Norðurlandahúsið og oman aftur á Bursatanga.

Tann eina morgunin morgun sluppu næmingarnir á fjall og komin aftur á skúlan fóru nakrir næmingar í holt við at gera døgurða, soleiðis at øll kundu eta saman í matarhølinum, áðrenn farið var í vikuskiftisfrí, upplýsir Jákup av Skarði, fyrstilærari í Nólsoyar skúla, sambært heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.

## Víðkaður tónleikapallur

Hóskvøldið klokkan 20 skipar Sunda bókasavn enn einaferð fyri tónleikapalli í Skálanum í Norðskála-Oyrar skúla.

Tónlekapallurin er eitt hugnakvøld, har høvið verður at hoyra góðan sang og tónleik, sum ung og eldri framføra. Eisini verður onkur felagssangur. Har verður ein fjølbroytt skrá, við bæði royndum og nýggjum nøvnum. Felags fyri tey er, at fólkini hava sína dagligu gongd her í Sundalagnum, og at tónleikurin eigur stórt rúm hjá teimum.

Afturat hesum føstu táttunum fær tónleikapallurin vitjan av fólki, sum í hesum døgum eru á sangskrivaraskeiði hjá tí navnframa Brett Perkins á Gjáargarði. Einki er at ivast í, at hetta verður eitt spennandi íkast til tiltakið, ið fer at geva áhoyrarunum eina hóming av menningini, sum fer fram millum okkara sang-og tónasmiðir.

Sum vanligt er, tá bókasavnið hevur tiltøk, er eisini ein góður drekkamuður at fáa, og bókasavnið er opið.




*Fyrsti parturin av vindmylluni kom til Nólsoyar í gjár*

# Nólsoy hitast við vindmyllu

**BILASØLA Í gjár komu fyrstu lutirnir av tveimum myndmylluum til Nólsoyar. Tað er Nólsoyar Orkufelag, ið stendur fyri verkætlanini, sum í fyrsta umfari kann umfata 40 hús**

Leo Poulsen

Fyri 6-7 árum síðani varð byrjað upp á eina stóra norðurlendska verkætlan sum í stuttum gekk út upp á, at Nólsoy skuldi gerast grøn oyggj. Byrjað var við ymsum mátingum, men verkætlanin datt tíverri niðurfyri.

Nú hevur Nólsoyar Orkufelag so loftað einum parti av verkætlanini, og við 1,8 milliónum í stuðli frá Innlendismálaráðnum hevur felagið nú keypt tvær eins vindmyllur.

Myllurnar komu við Norrönu mánadagin, og í gjár vórðu so fyrstu partarnir av vindmyllunum fluttar til Nólsoyar.

Ætlanin er at seta aðra mylluna upp norðan fyri bygdina, meðan hin skal vera til at taka sum eykalutir. Eina myllan megnar at hita smá 40 hús upp.

Bjarti Thomsen, sum er formaður í Nólsoyar Orkufelag, væntar, at vindmyllar byrjar framleiðslu einaferð í juni mánað.

leo@sosialurin.fo